# Liðugt á jólum

*Nýggi vegurin, sum verður gjørdur oman fyri Velbastað, verður liðugur á jólum*



*Tað gongur væl við vegagerðini oman fyri Velbastað, sum verður liðug til jóla*
*Mynd: Edvard Joensen*

Edvard Joensen

**Velbastað:** Vegagerðin oman fyri Velbastað gongur eftir ætlan, og liðugt verður á jólum, sigur Flóvin Jacobsen, verkfrøðingur. Talan er um vegastrekkið frá nýggja vegnum sunnan fyri Velbastað og niðan á Velbastaðháls.

Tað er partafelagið Á Heygnum í Søldarfirði, sum stendur fyri vegagerðini.

Vegastrekkið, sum er umleið tveir kilometrar til longdar, varð boðið út, og partafelagið Á Heygnum beyð sær til at gera arbeiðið fyri seks milliónir krónur. Hesa kostnaðarmeting fara teir at klára at halda, sigur Flóvin Jacobsen.

Hann sigur, at upprunaliga ætlanin var, at arbeiðið skuldi vera liðugt í juni í ár, og tað høvdu teir eisini klárað, um upprunaætlanin varð fylgd.

Men seinni varð so komið eftir, at tað var í grundini synd at leggja vegin mitt gjøgnum eitt fríøki, sum er á Velbastaðhálsi. Har plaga fólk at sigla við modelskipum á tjørnini, meðan onnur flúgva við smáum flogførum vestan fyri vegin. Tí varð valt at broyta vegføringina, soleiðis at vegurin fer eystan fyri tjørnina.

Tað gjørdi so, at áðrenn komið varð niðan á Velbastaðháls fyri vestan, var neyðugt við einum bugi suður á, fyri at ikki skuldi verða alt ov krapt sving, tá komið varð niðan á.

Hetta hevði so við sær, at arbeiðið varð eitt sindur seinkað. Men Flóvin Jacobsen sigur, at eftir hansara meting er hendan nýggja vegføringin nógv betri enn tann upprunaliga ætlaða.

Hinvegin hevur broytingin ikki ávirkað nakað sum so, tí teir hava verið í Kirkjubø og gjørt eitt parkeringspláss, soleiðis at kalla meðan bíðað varð.

Flóvin Jacobsen sigur, at teir hava bara brúkt bíligt tilfar, um ein kann siga so. Fyrst og fremst sjálvandi slíkt, teir hava fingið burtur úr spongingum í samband við vegagerðina. Men eisini avlopsgrót frá havnargerðini á Gomlurætt, sum ligið hevur við ferjuleguna og bíðað eftir at verða brúkt.

Smáa grótið, sum lagt verður ovast, er flutt av Lambareiði við skipi á Gomlurætt, haðani tað verður koyrt við lastbilum til vegagerðina.

# Gongur eftir flutningsbandi

*Tað gongur væl hjá eggvirkinum á Velbastað. Úrtøkan liggur umleið tey 90 prosentini*



*Anfinn Brekkstein letur væl at. Úrtøkan liggur umleið 90 prosent*
*Mynd: Edvard Joensen*

Edvard Joensen

**Velbastað:** Hønurnar í nýggja høsnarhúsinum á Velbastað tykjast væl fyri og verpa dúgliga. Eingin trupulleiki er at selja eggini, sigur eigarin, Anfinn Brekkstein á Velbastað.

Tað gongur bókstaviliga eftir flutningsbandi hjá nýggja eggvirkinum á Velbastað. Tað koma umleið 2.700-2.800 egg dagliga glíðandi eftir bandinum út í pakkirúmið, har Anfinn Brekkstein sjálvur annar stendur og tekur í móti og pakkar. Tað vil siga, at seinnapartarnar plagar hann tó at vera einsamallur, tí tá koma so fá egg. Tað liggur vanliga umleið tey hálvtannaðhundrað, sigur Anfinn Brekkstein. Hønunum dámar best at verpa um morgunin. Tað er bara onkur hendinga høna, sum hevur eitt sindur ilt við at koma »undan fjaðrunum« á morgni, ið verpur seinnapartin.

Tað ganga gott 3.000 hønur í húsinum, so úrtøkan er rættiliga góð. Fyrsta eggið varð vorðið 16. juni, sigur Anfinn Brekkstein.

Tað er eingin trupulleiki at sleppa av við eggini. Tey verða seld í Miklagarði og Keypssamtøkuni. Bæði í Havn og í bygdahandlunum hjá hesum fyritøkum. Eisini onkur annar minni handil í Havn selur føroysku eggini. Men eftirspurningurin er í løtuni meira, enn virkið klárar, sigur Anfinn Brekkstein.

Um prísin sigur hann, at hann er soleiðis, at tað melur runt.

Støddin er eisini við at vera í lagi, sigur Anfinn Brekkstein. Í byrjanini vóru tey eitt sindur smá, men nú liggur støddin frá medium og uppeftir, sigur hann.

Høsnarhúsið á Velbastað er eitt nýmótans hús, har hønurnar ganga leysar. Tær hava reiður eftir miðum gólvinum, har tær fara inn at verpa. Sjálvar síggja tær ongantíð eggið, tí tað rullar niður á flutningsbandið, sum síðan flytir tað út í pakkirúmið.

Eini tíggju prosent fara tó á gólvið, sigur Anfinn Brekkstein. Tey eggini verða hentað upp og koma soleiðis til sættis.

Hønurnar verpa vanliga tíðliga á morgni, og bandið verður sett í gongd umleið klokkan hálvum átta. Síðan koyrir tað til umleið klokkan níggju. Tá eru eggini pakkað.

Men høna skal eisini hava nátt og dag, og hóast tær ganga leysar, eru tær tó inni. So neyðugt er við at regulera ljósið, sigur Anfinn Brekkstein.

Hann sigur tó, at hann hevur ætlanir um at lata hønurnar sleppa at ganga úti oman fyri húsið. Enn er einki avgjørt í so máta, men tað er møguleiki fyri tí, sigur Anfinn Brekkstein.

# Nýggjur heilsølubygningur í Hvalvík

*Heilsølan, sum selur gravimaskinur og trillubørur í Hvalvík, flutti fyrr í summar í nýggjan bygning*

**Edvard Joensen**

**Hvalvík:** OK Heilsøla í Hvalvík flutti fyrr í summar í nýggjan bygning, á gamla havnarlagnum í Hvalvík. Har, sum bátaverksmiðjan fyrr stóð.

Teir arbeiða tveir mans hjá OK Heilsølu. Óli Karl Hansen, sum er stjóri, og Bergur Joensen, sum vit hittu í húsinum hendan dagin.

Bergur greiðir frá, at teir fyrr í summar fluttu í nýggja bygningin sunnalaga við gamla havnarlagið í Hvalvík. Í bygninginum er handil, goymsla og verkstaður til maskinurnar, teir selja.

Bygningurin var ikki dýrur, heldur Bergur Joensen. Sjálvur bygningurin mundi kosta umleið 600.000,- krónur, sigur hann. Tá innrættað var og klárt at lata upp, stóð hann í minni enn eini millión.

OK Heilsøla selur nevniliga alt frá gravimaskinum til trillubøruru við motori, umframt alskins smálutir og arbeiðsklæði.

Bergur Joensen dylur ikki fyri, at tað er verkstaðið, sum gevur tað nógva arbeiði. Maskinurnar, sum teir selja, skulu eisini hava ymsar tænastur, sum tær eldast. Og teir hava selt so mikið, sigur hann, at teir hava nokk at gera.



*Nýggja heilsølan í Hvalvík*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Tubbaksframleiðarar liggja eftirá

*Tubbaksframleiðarar hava ikki veitt rættar upplýsingar viðvíkjandi innihaldinum í teirra vøru, og teir eru dømdir at gjalda risastór endurgjøld í USA. Bylgjan breiðir seg nú til okkara leiðir*



Stefan í Skorini

Mitt í nítiárunum vórðu tey fyrstu sakarmálini førd ímóti tubbaksframleiðarum í USA. Teir vórðu ákærdir fyri ikki at hava sagt allan sannleikan um eiturevnini í tubbaki og teir vandar, sum standast av at roykja. Heldur ikki hava framleiðararnir ta røttu vørulýsingina á sigarettpakkunum.

Hetta hevur fingið bæði tað almenna heilsuverkið í teimum ymisku statunum í USA og privatpersónar at saksøkja tubbaksframleiðarar.

Í 1998 skuldu tubbaksframleiðarar í USA gjalda tí almenna 1320 milliardir krónur. Hesin peningurin skuldi fara til útreiðslur hjá heilsuverkinum, sum standast av royking. Hetta var tó bara tað ovasta av ísfjallinum, tí seinni hava privatpersónar, sum hava fingið varandi mein av at roykja, lagt sak ímóti tubbaksframleiðarunum - og hava eisini vunnið.

Í summar endaði eitt rættarmál í Florida í USA, har privatpersónar saksøktu tubbaksídnaðin fyri ikki at veita rættar upplýsingar um sína framleiðslu. Rættarmálið vardi í fleiri ár, og fleiri enn hundrað vitni vórðu avhoyrd í málinum.

Endin var tann, at tubbaksframleiðararnir skuldu gjalda roykjarum í Florida metstór endurgjøld, sum ongantíð hava verið at sæð nakrastaðni áður.

### Tubbak er væl kannað

Undir rættarmálinum førdi tubbaksídnaðurin fram, at einki er so væl kannað og staðfest, sum at royking og tubbak eru sera vandamikil og heilsuskaðilig. Tí skuldi eingin góð umbering verið hjá nøkrum at roykja, tí øll vita um hetta.

Læknar og vísindamenn hava kannað tubbak í eitt mannaminni, og lond hava brúkt nógvar milliardir til vísindaligar kanningar, søgdu framleiðararnir eisini undir rættarmálinum.

Hinvegin er tað nú prógvað, at framleiðararnir hava vitað um misvísandi upplýsingarnar á pakkunum síðani fyrst í sjeytiárunum, men hava valt ikki at gera nakað við málið. Hetta er nú komið teimum aftur um brekku, og teir eru dømdir at gjalda stór endurgjøld.

### Skeivar mátingar

Nú hevur henda anti-tubbaks bylgjan breitt seg til okkara leiðir, og bæði í Onglandi og í Norðurlondum eru tubbaksframleiðararnir illa sperdir í hesum døgum.

Orsøkin, til at tubbaksframleiðararnir eru komnir so illa fyri er, at vørulýsingin í næstan øll hesi árini hevur verið skeiv. Hetta hava framleiðararnir gjørt tilvitað, sjálvt um teir fyri langari tíð síðani hava varnast skeivleikan.

Serfrøðingar siga, at upplýsingarnar á pakkunum eru beinleiðis misvísandi. Mongdin av eiturevnum í Prince, Look, Cecil og King´s, sum eru væl kend merki her á landi, er væl hægri enn tað, ið stendur á pakkunum.

Hesir skeivleikar eru komnir av at mátin, sum tubbaksfyritøkurnar hava brúkt at máta innihaldið av eiturevnum, ikki gevur eina rætta mynd av tí veruliga innihaldinum í sigarettunum.

Í løtuni verða eiturevnini í eini sigarett máta, við at ein maskina roykir sigarettina, og so sæst hvussu stórar mongdirnar av eiturevnum eru. Trupulleikin er bara tann, at maskinan ikki tekur eins nógvar guvur og ein vanligur roykjari, og tí eru ávísingarnar á einum sigarettpakka ikki rættar, men villeiða hinvegin forbrúkaran.

Eisini verða nógv íblandingarevni latin í tubbakið og sigarettpappírið, sum gera, at enn meira nikotin verður andað inn.

Tí er innahaldið av nikotini og tjøru í veruleikanum tvær til tríggjar ferðir størri, enn ávísingin á pakkunum sigur. Í teimum veikaru sløgunum av sigarettum er munurin enn størri. Um roykt verður nógv av eini veikari sigarett, kann ein roykjari fáa 30 ferðir so nógv eiturevni niður í seg, enn upplýst er á pakkanum.

Alt hetta hava framleiðararnir vitað, men hava einki gjørt við tað.

### Listin almannakunngjørdur

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur ein tubbaksframleiðari almannakunngjørt ein lista, har øll íblandingarevnini umframt tubbakið, sum finnast í eini sigarett, standa.

37 ymisk íblandingarevni eru á listanum, sum Skandinavisk Tobakskompagni hevur latið úr hondum.

Hesin listin verður tó fyri lemjandi atfinningum, tí at listin setir fleiri spurningar, enn hann gevur svar. Tað er greitt, at nógv fleiri íblandingarevni verða brúkt, enn listin ber boð um.

Tað kemst tó ikki uttanum, at Skandinavisk Tobakskompagni, sum hevur 97% av danska marknaðinum, tilvitað hevur sett villeiðandi upplýsingar á pakkarnar.

Tískil er væntandi, at tubbaksframleiðarar í Norðurlondum eisini verða saksøktir av privatum og tí almenna, sum vit hava sæð í USA.

### Roykjarar eru bíligari

Útrokningar, sum eru gjørdar í Hollandi, vísa, at ein roykjari er umleið 15% bíligari í heilsuútreiðslum, men tað er tí teir doyggja skjótari og kosta harvið ikki so nógv.

Danska heilsuverkið geldur 5,5 milliardir krónur um árið til sjúklingar, sum hava fingið mein av royking. Danski statskassin fær hinvegin 10 milliardir krónur um árið í avgjøldum frá tubbaki.

Hesi tøl fara tó neyvan at forða dønum í at saksøkja tubbaksframleiðarar, tí at teir hava givið sínum forbrúkarum villeiðandi upplýsingar um sína vøru, og tað er ólógligt.


